Dan Michael Knudsen

Fra: Sands Borgarstjóri <borgarstjorin@sandur.fo>
Sendt: mánadagur, 17. november 2025 17:13
Til: Doris Bjarkhamar; Journalin hjá LMS
Cc: Marnar Højsted; Sands Kommuna
Emne: Hoyringsskriv til Suðuroysatunnilin 17/11-25
Vedhæftede filer: 2794_001.pdf; 3416_001.pdf

Hey Doris

So var hoyringskrivið klárt og saman við hinum hoyringskrivinum frá 12 desembur 2024.

Vónandi verður atlit tikin til bæði hoyringskrivini.

Vinarliga / Kind Regards

Kristian Oskar Henriksen
Borgarstjóri
Tlf 211930
borgarstjorin@sandur.fo

Sands kommuna
Mørkin Mikla 3
FO-210 Sandur
sandur@sandur.fo
sandur.fo

LM-066/2025

Sands Kommuna ... trygd & trivnaður fyri øll
Telefon 661.030 • Telefax 361.734 • Postbox 10 • Mørkin Mikla 3• FO-210 Sandi
T-postur: sandur@sandur.fo
Peningstovnar: 6460-1012691 & 9181-4983043

Løgmansskrivstovan
Tinganes
100 Tórshavn

Sandur 17. november 2025

Hoyringarskriv um Suðuroyartunnilin – vegaføring umvegis Sands bygd

Sands kommuna vil við hesum enn einaferð gera viðmerkingar til uppskotið til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum.

Sands kommuna vísir sum heild til tey sjónarmið, sum blivu skrivað í hoyringarskrivinum frá Sands kommunu tann 12. desember 2024. Tað, sum víst varð á í hesum hoyringarskrivi, er enn líka so aktuelt sum tað var fyri einum ári síðani, tá tað eisini hevði alstóran skund at fáa samtykt eitt lógaruppskot um Suðuroyartunnilin.

Hoyringarskrivið frá 12. desember 2024 er hjálagt hesum hoyringarskrivinum.

Sands kommuna skipaði tann 12. november 2025 fyri borgarafundi á Sandi í sambandi við uppskotið, sum nú fyriliggur. Eisini í ár var sera nógv fólk á fundi. Fundarfólkið var samt um og endurtók, at skeivar avgerðir um linjuføring umvegis Sands bygd fara at hava við vanlukkuligar fylgjur fyri bygdina og harvið fyri oynna alla.

Sands kommuna undrast sum heild yvir, at tað at síggja til verður farið so lætt um vegaføringina um Sandoynna og serliga Sands bygd. Tað undrar eisini Sands kommunu, at tað verður farið so lætt um sjónarmiðini og ynskini hjá einari samdari Sands bygd.

Heimasandsfólk unna enn sum áður sera væl suðuroyingum eina trygga og góða farleið. Fyri fólk á Sandi ber tó ikki til at skilja, at tað verður hugsað um at leggja vegin í Sandoynni á ein hátt, sum tað er so stór mótstøða ímóti á Sandi. Hvat er vunnið við einari farleið til Suðuroynna, um hon ger stóran skaða á pláss, um liggja á vegnum til Suðuroy.

Sands kommuna biðjur um, at samráðingar sum skjótast verða tiknar upp við Sands kommunu um eina skilagóða loysn fyri ferðsluna frá Sandoyartunnlinum til Suðuroyartunnilin.

Eingin vegaføring gjøgnum Sands bygd.

Tað er eitt krav frá Sands kommunu vegna alt fólkið, sum býr á Sandi, at eingin vegur verður gjørdur gjøgnum Sands bygd frá Sandoyartunnlinum til Suðuroyartunnilin.

Sands kommuna vil í hesum sambandi vísa til tær grundgevingar, sum vórðu settar fram í hoyringarskrivi frá Sands kommunu frá 12. desember 2024. Ein vegur gjøgnum Sands bygd vil millum annað føra til, at Sands bygd verður klovin í tvey. Hetta vil eisini í stóran mun forða fyri møguligum útbyggingum av Sands bygd í framtíðini.

Tí vil Sands kommuna eins og bygdarfólkið harliga mótmæla at vegurin verður gjørdur gjøgnum bygdina. Tað uppskotið, sum nú fyriliggur, har øll ferðslan verður førd gjøgnum bygdina umvegis rundkoyringar, vil oyðileggja bygdina.

Tann tunga ferðslan, sum vil ganga ígjøgnum bygdina í øllum byggitíðarskeiðinum, vil eisini dálka illa í bygdini og hava við sær eitt sera ringt umhvørvi í alla ta tíð, sum tunnilin kemur at standa í gerð.

Vegaføringin má leggjast føst nú

Sum víst varð á í hoyringarskrivi frá 12. desember 2024 so má vegaføringin leggjast føst áðrenn farið verður í gongd við at bora Suðuroyartunnilin.

Sands kommuna metir, eins og bygdarfólkið, at besta loysnin er hon hjá alternativa tunnilsbólkinum, har tunnilin fer niður norðan fyri Múlan, upp í Skúvoy og so til Sandvíkar. Hetta vil vera tann skilabesta loysnin fyri fólkið í Suðuroy, fyri Heimasandsfólk, eins og hendan loysnin vil tryggja fast samband til Skúvoyar.

Hendan loysnin, har tunnilin fer niður norðan fyri Múlan, vil eisini spara Sands bygd fyri teimum oyðileggingum, sum núverandi uppskot hjá Tunnilsfelagnum vil hava við sær fyri bygdina.

Um valt verður ímóti fólkaviljanum i Sands bygd, at halda fast við linjuføringina í uppskotinum, er tað eitt treytaleyst krav frá Sands kommunu, at atkoman til Suðuroyartunnilin verður løgd uttanum Sandsbygd, bæði í byggitíðarskeiðnum og eftir at tunnilin er tikin í brúk. Tí mugu eventuellar atknýttar verkætlanir at fremja hetta, verða knýttar at útbjóðingini beinavegin, og verða framdar áðrenn sjálv byggingin av Suðuroyartunlinum fer av bakkastokki.

Samanumtikið

Sum nevnt omanfyri, so vil Sands kommuna sum heild vísa til tær viðmerkingar, sum blivu gjørdar í hoyringarskrivinum 12. desember 2024.

Sands kommuna heitir staðiliga á Løgmansskrivstovuna um at broyta uppskotið, soleiðis at ein tunnil til Suðuroy ikki verður ein vanlukka fyri Sands bygd.

Sands kommuna biður um fund við Løgmansskrivstovuna, um uppskotið verður sent til Løgtingið soleiðis at Sands kommuna fær ført síni sjónarmið fram. Fyrireikararnir av alternativa uppskotinum eiga eisini at verða bodnir á fund, soleiðis at greiðast kann frá uppskotinum.

Vegna Sands kommunu

Kristian Óskar Henriksen,

borgarstjóri

LM-066/2025

Sands Kommuna
Mørkin Mikla 3
FO 210 Sandur

Sandur 12. desember 2024

Løgmansskrivstovan
Tinganes
100 Tórshavn

Hoyringarskriv um Suðuroyartunnilin - mál 24/23467

Sands kommuna vil við hesum gera viðmerkingar til uppskotið til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum. Sands kommuna ger í høvuðsheitum viðmerkingar til tann partin av uppskotinum, sum er av heilt avgerandi týdningi fyri Sands kommunu og íbúgvarnir í kommununi.

Hetta er fyrst og fremst linjuføringin av komandi Suðuroyartunnlinum og harav fylgjandi vegagerð í Sands kommunu og kring kommununa. Um verandi uppskot verður samtykt verður talan greitt um eina vanlukku fyri Sands bygd og kommunu.

Við verandi uppskoti missir Sandoyggin stór náttúrðuvirði, sum ikki fáast aftur. Hetta eru eyðkenni, sum Sandoyggin er kend fyri. Ein vegaføring eftir tí uppskoti, sum nú fyrliggur, vil taka hesi eyðkenni frá Sandoynni.

Sands kommuna er av tí avgjørdu fatan, at tær viðmerkingar, sum verða gjørdar í hesum skrivi, eisini eru av sera stórum týdningi fyri aðrar partar í Føroyum enn tey, sum búgva og virka á Sandi. At fáa eina skilagóða og burðardygga tunnilsloysn er av stórsta týdningi fyri eina tjóð sum teirri føroysku, sum ynskir at vera tald millum heimsins mentaðu tjóðir.

Tað er eitt eyðkenni fyri hetta málið, at allir sandingar standa saman um at ynskja suðuroyingum eina góða og trygga farleið. Tað hevur verið Sandoynni allari til stóra signing, at Sandoyartunnilin gjørdist veruleiki. Hetta lat upp nýggjar møguleikar fyri fólkið í oynni. Á sama hátt ber til at siga, at Sandoyggin lat seg upp og í størri mun enn frammanundan gjørdist meira atkomilig og opin fyri øllum Føroya fólki. Her hevur gingið sjón fyri søgn við øllum teimum vitjandi, sum oyggin hevur havt, síðandi Sandoyartunnilin lat upp fyri almennari ferðslu.

Eins og sandingar ynskja og unna suðuroyðingum somu møguleikar sum teir, ið vit hava fingið, so eru vit á Sandi sannførd um, at suðuroyingar eisini unna okkum á Sandi at kunna eiga Sands bygd frameftir sum eina sunna og heila bygd.

At sandingar og Sands kommuna ikki ynskja at forða verkætlanini, men ynskja at bjarga bygdini, sæst einabest við, at vit hava fingið ein bólk undir leiðslu av einum av okkara frægu synum at gera eitt

alternativt uppskot, sum verður lagt fram fyri Føroya fólki til kjak og sum alternativ til ta oyðilegging, sum verandi lógaruppskot vil hava við sær fyri bygd okkara.

Hoyringarfreistin eigur at verða longd

Á borgarafundi, sum Sands kommuna skipaði fyri 9. desember 2024, var breið semja millum fundarfólki um at standa saman um ein Suðuroyartunnil. Dentur varð lagdur á, at sandingar ikki ynskja at leggja forðingar í vegin fyri, at ein Suðuroyartunnil verður gjørdur.

Tað var eisini breið semja á borgarafundinum um at standa saman um tað alternativa uppskotið, sum varð lagt fram fyri borgarafundin.

Tær viðmerkingar, sum eru gjørdar í hesum hoyringarskrivi, eru í høvuðsheitum grundaðar á tað, sum kom fram á borgarafundinum 9. desember 2024. Skotbráðið at svara og gera viðmerkingar til lógaruppskotið er stutt og tí kann hugsast, at Sands kommuna hevur fleiri viðmerkingar enn tær, sum eru nevndar í hesum skrivi. Hetta skrivið er sent við tí fyrivarni, at tað kunnu hugsast at koma fleiri viðmerkingar seinni.

Tað eru nógv fólk á Sandi og kring landið alt, sum hava sína áskoðan á hetta uppskotið. Tí eigur freistin fyri at gera viðmerkingar til uppskotið at verða longd, so at eisini onnur enn Sands kommuna fáa møguleika at gera viðmerkingar til málið. Tað er óskiljandi, at tað skal hava so alstóran týdning at samtykkja hetta uppskotið nú beint uppundir jól heldur enn at lata uppskotið fáa ta virðiligu og dyggu viðgerð, sum uppskotið krevur.

Vegaføringin gjøgnum Sands bygd má leggjast føst nú

Verandi lógaruppskot hevur í § 3 eina heimild til tunnilsfelagið til at taka avgerð um og gera sáttmála um hvar tunnilsmunnarnir skulu vera. Sambært uppskotinum skal tunnilsmunnin Sandoyarmegin vera í Djúpadali.

Landsverk fær uppgávuna at gera veg gjøgnum Sands bygd og Tunnilsfelagið skákar sær undan hesi ábyrgd. Eingin játtan er til hesa uppgávuna, sum støða kann takast til seinni. Tað vita øll, at um tað fyrst er samtykt, at tunnilin skal ganga úr Djúpadali til Suðuroyar, so verður tann avgerðin ikki broytt. Tað er ivaleyst eisini orsøkin til, at Tunnilsfelagið skal fáa heimild til at gera tunnilsinntøk nú og støða skal so seinni takast til vegaføringina fram til tunnilsinntakið. Tá er veruleikin um hvar tunnilin skal liggja staðfestur og so má vegagerðin vera sum hon vera kann.

Verður hetta uppskotið samtykt, uttan at ein haldgóð loysn er funnin á ferðsluni í Sandoynni, er stórur vandi fyri, at tað fyri Sands bygd verður sum fyri Leirvík, har bygdin bleiv klovin í tvey av vegaføringini gjøgnum bygdina.

Við tí smámunarligu fíggjarorku, sum er tøk til vegagerð á føroysku fíggjarlógini, er sera ivasamt, um neyðugur peningur nakrantíð verður tøkur til at gjalda fyri ta vegagerð, sum er neyðug. Vit eru sannførd um, at um tað verður útsett at taka endaliga støðu til vegagerðina á Sandoynni, so vendist ikki aftur. Tá er stórur vandi fyri, at einki munagott verður gjørt fyri ferðsluna á Sandoynni, sum so helst fer at ganga gjøgnum bygdina á Sandi eftir teimum vegum, sum nú liggja har.

Um ikki avgerð verður tikin um eina skilagóða vegagerð nú, so verður endin, at eingin nýggj farleið verður frá tunnilsmunnanum á Sandoyartunnlinum fram til tunnilsmunnan á Suðuroyartunnlinum. Søgan vísir okkum, at verða avgerðir av hesum slagi útsettar, so er sera ósannlíkt at nakað skilagott úrslit seinni verður samtykt.

Tað eru í veruleikanum bara tvey uppskot til vegaføring. Tann triði møgulekin, sum hevur verið frammi undan borgarafundinum 9. desember 2024, nevniliga at at hava vegin uppi á Traðarhamri, er ikki kannaður nærri og er tí ikki, um lógaruppskotið kemur til viðgerðar óbroytt, ein veruligur møguleiki. Fyri Sands kommunu hevði tað verið eitt kærkomið alternativ afturat at fingið møguleikan fyri at lagt vegin eftir Traðarhamri.

Sambært fyriliggjandi lógaruppskotið er ein møguleiki at leggja vegin eystan fyri Sandsvatn meðan hin umrøddi møguleikin er at leggja vegin vestanfyri vatnið. Hvørgin av hesum ætlaðu farleiðum tekur atlit til verandi bygdalív, til landbúnað, til verandi búsetingar umframt til møguleikar fyri framtíðar útbyggingum av Sands bygd.

Talan er um tvær sjáldsama harligar og ómentaðar loysnir, sum fara buldrandi gjøgnum landbúnaðarjørð, sum av nógvum verður mett sum tann besta í Føroyum. Skal sleppast undan, at stórur og óbótaligur skaði stendst av vegaføringini kann hvørgin av ætlanum í verandi uppskoti fremjast.

Sandingar fáa seg ikki at trúgva, at Føroya landsstýri kann finna uppá at leggja hetta uppskotið fyri Føroya løgting til viðgerðar, tá tað nú við einum alternativum uppskoti er skjalprógvað, at alternativir møguleikar eru. Sands kommuna mælir staðiliga til, at arbeitt verður víðari við tí alternativi uppskoti til farleið, sum varð lagt fram á borgarafundinum tann 9. desember 2024.

Landbúnaður

Sambært fyriliggjandi uppskoti skal Tunnilsfelagð fáa heimild at gera ein so stuttan tunnil sum yvirhøvur gjørligt, uttan at atlit á nakran hátt verða tikin fyri Sands bygd og tí fólki, sum har býr. Heldur enn at gera eina samanhangandi heildarloysn, so skal asfalt leggast á nakrar av bestu teigunum í landinum. Her mugu landsins politikkarar vita, at tað, sum einaferð er lagt undir asfalt, verður ikki náttúra aftur.

Við ætlaðu vegaføringini er landbúnaðurin á Sandi hóttur. Partur av hesum landbúnaði eru landskendu velturnar á Sandi, sum framleiða stórar nøgdir av grønmeti til allan føroyska marknaðin.

Sambært uppskotinum um løgtingslóg um Suðuroyartunnilin fer ætlaða vegaføringin at ganga beint gjøgnum nakað av tí besta landbúnaðarøkinum, sum finst í Føroyum. Hetta er ikki burðardyggur politikkur og hetta er als ikki í samsvari við ynskið um stuttflutta matvøruframleiðslu og størri nøgdir av føroyskt framleiddum grønmeti

Tað er ein stór andsøgn millum fyriliggjandi uppskot og so, at núsitandi samgonga í sínum samgonguskjali frá 2022 skrivaði hetta:

> Orðaður verður ein landbúnaðarpolitikkur við ítøkiligum málum, har dentur verður lagdur á at menna føroyskar landbúnaðarvørur. Ferð verður sett á føroyska framleiðslu, og vit skulu gerast meira sjálvbjargin við fleiri landbúnaðarvørum. Ítøkilig mál verða sett fyri størri framleiðslu av grønmeti,

kjøti, mjólkarvøru og stráfóðri. Verandi stuðulsskipanir verða knýttar at settu málunum. Í lendisætlanini fyri Føroyar verður tryggjað, at besta landbúnaðarjørðin ikki verður nýtt til onnur endamál.

Verður fyriliggjandi uppskot um vegaføring samtykt, hevur Føroya Løgting beint mótsatt tí, sum varð skrivað í samgonguskjalinum júst tryggjað, at besta landbúnaðarjørðin í landinum ikki verður brúkt til landbúnað, men til at leggja undir asfalt. Fyriliggjandi uppskot gongur júst gjøgnum bestu landbúnaðarjørðina í Føroyum og hetta hóast, at tað er heilt óneyðugt og uttan at alternativir møguleikar eru kannaðir og umrøddir.

Velturnar á Sandi framleiða stórar nøgdir av grønmeti, sum verða seldar kring alt landið. Hetta er av allarbestu landbúnaðarjørðini í landinum. Líknandi møguleikar fyri landbúnaði finnast ikki aðrastaðni á Sandoynni og fáa staðni í landinum annars.

At leggja økið, har ein stórur partur av føroysku grønmetisframleiðsluni stavar, undir asfalt, er púra í andsøgn við landbúnaðarpolitikkin hjá landinum og við samgonguskjalið frá 2022.

At føroyskur landbúnaður mennist út frá økinum á Sandi er eisini samsvari við, at áhugan í Føroyum fyri at velta egið grønmeti økist í hvørjum. Royndir frá Sandáfløttinum hava havt við sær, at tað hevur borið til at sett 15.000 grønmetisspírar upp í ár kring alt landið.

Sjálvur miðdepilin fyri føroyska grønmetisframleiðslu er hóttur við verandi uppskoti til linjuføring. Við verandi uppskoti til linjuføring er vandi fyri, at ein stórur partur av grundarlagnum undir allari føroyskari grønsmetisframleiðslu verður burtur.

Árinsmeting

Tað sæst á verandi uppskoti til lóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum, at ongar metingar av ávirkanini á umhvørvið eru gjørdar.

Sands kommuna er vitandi um, at krøv ikki eru í føroyskari lóggávu um, at árinsmetingar skulu gerast, tá stórar verkætlanir, sum eyðsæð hava stóra ávirkan á umhvørvið, eru í umbúnað, tíansheldur tá hesar verða settar í verk. Helst ger hetta, at verandi uppskot um vegaføring ikki ger seg formliga inn á galdandi lóggávu, tá yvirhøvur eingin meting er gjørd av árininum á umhvørvið.

At eingin lóg sigur, at ein atburður er skeivur, ger tó ikki, at atburðurin er rættur. Tað er eingin ivi um, at tað skuldi verið sjálvsagdur partur av hesi Føroya størstu verkætlan, at metingar blivu gjørdar av ávirkanini á umhvørvið. Hetta er sjálvsagdur partur av fyrireikingini, tá samsvarandi stórar verkætlanir eru í umbúnað og verða settar í verk í grannalongum okkara.

Heilt nógv av økinum, sum ætlaða verkætlanin skal ganga ígjøgnum, átti at verið friðað sum varðveitingarverd øki.

At ætlanin nú er at samtykkja eina lóg, sum greitt er skaðilig fyri umhvørvið, er eisini sera marghátttligt, tá hugsað verður um, at júst sitandi samgonga sigur seg leggja stóran dent á umhvørvið. Somuleiðis er nýggj nátturuverndarlóg komin í gildi í 2023.

Í § 1 í lógini um náttúruvernd frá 22. mai 2023 er ásett, at:

> Endamálið við løgtingslógini er at røkja margfeldið og tær vistfrøðiligu tilgongdirnar í náttúruni, bæði fyri náttúruna sjálva og fyri náttúruna sum grundarlag undir burðardyggum virksemi, tilfeingi, mentan, heilsu og trivnaði hjá Føroya fólki nú og í framtíðini.

§ 4 í náttúruverndarlógini hevur hesar orðingar:

> Øll hava skyldu til at fara fram við fyriliti og gera tað, sum rímiligt er, til, at náttúrumargfeldið ikki verður fyri skaða. Verður virkað sambært loyvi frá almennum myndugleika, er fyrilitsskyldan at rokna sum lokin, um fyritreytirnar fyri loyvinum framvegis eru til staðar.

Tað er ikki at røkja margfeldið og vistfrøðiligu tilgongdirnar í náttúruni, eins og tað ikki vil vera í samsvari við endamálið við lógini annars, um verandi uppskot verður samtykt. Hetta vil eiheldur vera at fara fram við fyriliti og at gera tað, sum rímiligt er.

Heldur enn at leggja fram lógaruppskot, sum vil legga stór náttútuvirði undir asfalt, og minkar munandi um møguleikarnar hjá Føroyum at framleiða grønmeti og landbúnaðarvørur annars, áttu nógv av teimum økjum, sum fyriliggjandi uppskot fevnir um, at verið skipað sum verndarøki eftir kapittli 4 í lógini um umhvørvisvernd.

Um verandi lógaruppskot verður samtykt, eigur avvaraðandi landsstýrisfólk at seta í verk eina bráfeingisvernd av økjum á Sandi og helst eisini í Djúpadali eftir § 27 í lógini.

Bæði í Sands bygd og í Djúpadali kring Stóravatn eru stór náttúrðuvirði, sum ein breiður landsvegur 35 metrar frá vatninum fara at gera seg inn á. Náttúruvirðini á Sandi eru í stórum vanda við fyriliggjandi uppskoti.

Alternativa uppskotið

Sum tað er øllum kunnugt, er ein komandi Suðuroyartunnil nógv størsta verkætlan í Føroya søgu. Í mun til støddd á landi og búskapi er hetta helst ein hin stórsta íløgan nakrantíð um okkara leiðir. Hetta ger, at íløgan, sum fer at seta dám á føroyska samfelagið í fleiri ættarlið, krevur nógv umhugsni. Her má ikki leypast framav.

Við fyriliggjandi uppskoti eru bara leiðirnar eystanfyri og vestanfyri Sandsvatn við tí ávirkan, sum hesi hava á bygdina, umhugsaðar. Ongar kanningar eru gjørdar av einari farleið eftir Traðarhamri, sum hevði sloppið Sands bygd undan ringastu oyðileggingini.

Hetta er ikki nóg góð fyrireiking til so stóra verkætlan. Við hesum í huga fekk Sands kommuna ein ráðgevarabólk at fyrireika og gera uppskot um alternativar møguleikar til hvussu vegaføringin kann skipast.

Hetta alternativa uppskotið varð lagt fram á borgarafundi tann 9. desember. Viðmerkingar vóru til uppskotið, herundir um hvar ein tunnil undir Sandsbygd skuldi hava sítt inntak, men breið semja var millum fundarfólki um, at hetta er eitt uppskot, sum tað eigur at verða arbeitt víðari við.

Tað er heilt greiða fatanin hjá Sands kommunu, eins og hjá fundarfólkinum á fólkafundinum 9. desember 2024, at støða eigur at verða tikin til hetta uppskotið og til vegaføringina sum heild, áðrenn farið verður undir at gera tunnilsinntøk v.m. í Djúpadali. Hetta má og skal vera partur av núverandi lógaruppskoti og av tí lóg, sum møguliga verður samtykt av Føroya Løgtingi.

Sands kommuna heitir staðiliga á Løgmansskrivstovuna um at taka hetta uppskotið við í fyrireikingarnar av lógaruppskotinum og geva tí ta viðgerð, sum uppskotið og alt málið um Suðuroyartunnilin hevur uppiborið.

Sands kommuna mælir til, at uppskotið um at ein tunnil verður gjørdur undir Sands bygd, verður tikið til eftirtektar. Við hesum uppskotinum verður tunnilsmunnin norðanfyri bygdina og tað slepst undan teimum stóru og ógvisligu inntrivum, sum ein loysn sambært fyriliggjandi uppskoti vil hava við sær.

Sands kommuna tekur eisini undir við, at tunnilin kemur upp í Skúvoy, soleiðis at skúvoyðingar fáa ágóðan av tí metstóru íløgu, sum er í umbúnað. Ein eyðsæddur fyrimunur við hesum skuldi verið, at longdin á tunnlinum tá er býtt í tvey. Vegalongdin yvirhøvur verður eisini styttri, um alternativa uppskotið verður brúkt.

Tað hoyrir við til hetta, at munurin á kostnaðinum millum alternativa uppskotið, sum varð lagt fram á borgarafundinum 9. desember og loysnunum sambært lógaruppskotinum hjá Løgmansskrivstovuni, er lítil og eingin. Hetta er ikki minst galdandi, tá hugsað verður um støddina á samlaðu verkætlanini. Tí eigur Løgmansskrivstovan greitt at kanna hesar møguleikar, sum Tunnilsfelagð at síggja til ikki hevur kannað sum part av sínum uppskoti.

Sum tað bleiv greitt frá í sambandi við framløguna av alternativa uppskotinum, so vil ein tunnilsmunni norðanfyri Sands bygd eisini gera møguleikarnar fyri einari munagóðari tilbúgving Sandoyarmegin ein komandi Suðuroyartunnil munandi betri.

Ein tunnilsmunni norðanfyri Sands bygd vil eisini hava við sær, at tað slepst undan at gera stór inntriv í umhvørvið kring Stóravatn og í Djúpadali annars.

Framløgan av alternativa uppskotinum er hjáløgd hesum hoyringarskrivi sum partur av viðmerkingunum hjá Sands kommunu. Fyrireikararnir av hesum uppskotinum eru fúsir at greiða Løgmansskrivstovuni frá uppskotinum.

Aðrar viðmerkingar frá borgarafundinum 9. desember 2024

Freistin at gera viðmerkingar er ov stutt. Hetta varð ført fram á borgarafundinum 9. desember og Sands kommuna tekur undir við hesum. Tað eigur ikki at bera til at samtykkja eitt so álvarsligt lógaruppskot uttan, at allir partar hava havt fullgóðan møguleika at siga sína hugsan.

Ein annar spurningur, sum varð havdur á lofti á borgarafundinum, var um ikki landsmyndugleikarnir við fyriliggjandi uppskoti leggja upp til at ganga uttaum allar friðingar og náttúratlit annars.

Fleiri høvdu á munni, at ein vegaføring eftir fyriligjandi uppskoti fer at kloyva Sands bygd í tvey. At hava ein stóran og breiðan landsveg mitt ígjøgnum bygdina fer heilt vist at gera, at samanhangurin í bygdini, sum eru mentur yvir fleiri øldir, við eitt verður oyðilagdur.

Landsverk hevur í sínum upprunaliga uppskoti til vegaføring eisini lagt upp til, at tunnilsmunnin skuldi vera norðanfyri Sands bygd.

Fundarfólkið fegnaðist um, at eitt alternativt uppskot var gjørt, tí hetta, umframt at bjarga Sands bygd, eisini vísir, at uppskotið til loysn hjá Tunnilsfelagnum er ikki bíligasta loysnin.

Tað undraði fundarfólkið, at tað bara eru tvey upppskot til vegaføring, sum hvørt er verri enn hitt fyri Sands bygd. Somuleiðis varð ført fram, at tað sum ein sjálvfylgja átti at verið gjørd ein árinskanning av verkætlanini fyri at fáa kannað hvat verkætlanin fer at merkja fyri náttúruna og samfelagið annars.

Samanumtikið

Við hesum hoyringarskrivi hevur Sands kommuna víst á tey viðurskifti, sum kommunan nú er kunnug við. Fyrivarni verður sum áður nevt tikið fyri at koma aftur við fleiri viðmerkingum.

Sands kommuna heitir staðiliga á Løgmansskrivstovuna um at broyta uppskotið, soleiðis at ein tunnil til Suðuroy ikki verður ein vanlukka fyri Sands bygd.

Sands kommuna biðjur um fund við Løgmansskrivstovuna áðrenn uppskotið verður sent til Løgtingið soleiðis at Sands kommuna fær ført síni sjónarmið fram. Fyrireikararnir av alternativa uppskotinum eiga eisini at verða bodnir á fund, soleiðis at greiðast kann frá uppskotinum.

Vegna Sands kommunu

Heri Sverrason, borgarstjóri